6. partur hjá Andrias í Tarti:

# Kundi eins væl verið farin við grindabátinum í 1939

**Sum áður greitt frá hevði FF-blaðið eina røð við frásøgn frá tí 100 ára gamla Andrias í Tarti um hansara lív á landi og sjógvi. Blaðið náddi at hava fimm partar, áðrenn tað var niðurlagt vegna formansskiftið í FF, og hevur henda frásøgn verið sera væl umtókt. Røðin kemur tískil at halda áfram í Sosialinum.**

**Í 5. parti komu vit fram til 1949, tá Andrias var við trolaranum "Nólsoyar Páll".**

**Upptøkurnar við Andrias eru tiknar upp í fleiri tíðarskeiðum, og nú verður farið nakað væl aftur í tíðina aftur, nevniliga til tíðina, tá Andrias var smádrongur, og hann byrjar við at greiða frá hendingum í hesi tíðini**

## Samrøða



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo



*Andrias á 100 ára degnum saman við sínum søguskrivara*

Eg minnist so væl árið, tá funningsfólkini doyðu úti. Tað var í 1917. Eg havi veri 11 ára gamal, og Hans beiggi var eitt gott ár eldri. Hetta var ein so fínur dagur til veður. Tað var nógv útliðið, og tað hevur nærkast jólum. Tað hevur nokk verið eitt sindur av kava, tí heimi í Sjóvartúni fóru vit "at renna um tún", sum vit kallaðu tað, tað var eitt spæl, vit høvdu. Nú kemur ein sovorðin himmalsins ódn um skýmingina. Tað var so ringt, at tað var ikki hugsingur um hjá okkum at koma inn um ánna. Sofus Rinkustein leiddi okkum inn. Hann var sterkur maður og nógv eldri enn vit. Tá vit komu inn um ánna, nú vísir tað seg, at pápi er farin at dyrgja saman við gamla Hans Jacob Abrahamsen, sum vit róptu, og Poul Jóhannes Gaard undir Garði. Teir dyrgdu út fyri Kamarshellu og fóru til róðurs beinanvegin inn í Víkar. Teir vistu ikki, hvar teir vóru, tað var verri veður enn so. Hann má hava verið norðan í ættini, tá hann lá útav eisini.

Teir fóru til árar, men teir vóru so komnir yvir í Kósina, so tað hevur ikki verið langt inn í dráttin har. Men nú kemur ein rang hvirla og koyrir teir inn í mølina innan fyri Flatastein, sum var ein stórur steinur, sum stóð har, og teir blivu bjargaðir. Tað var eitt undur.

Tað var eitt forferdiligt veður tað kvøldið. Tað hevði verið heilt forferdiligt, um tað hevði komið mitt um dagin, tí tað er vist, at nógv fólk hevði verið í torvi millum bygdir ella burtur í haga tann dagin. Ein genta, sum var um aldur sum eg, hon kallaðist Maja Klein. Hon var á veg inn í Víkar, og tá hon var komin inn um Hálvmørkshandilin, tá feyk hon útav bakkanum, men hon kláraði tað.

**Søgan um funningsfólkini er henda:**
Um ódnarveðrið 1. desember í 1917 síggja vit í Dimmalætting og Tingakrossi, at fleiri fólk vóru í lívsvanda, og at í minsta lagi 4 fólk lótu lív í tí ringa veðrinum. Hevði streymurin verið til vildar, so høvdu nógv fleiri bátar verið til útróðrar, og so hevði skaðin verið uppaftur verri.

Tvær systrar úr Funningi, onnur tænti í Hvalvík og hin við Norðskála, vóru á veg heim at vitja foreldrini



*Úr Færøske Kulturbilleder: Fiskur verður avreiddur á Viðareiði, men kundi eins væl verið í Oyndarfirði*



*Jógvan í Billustovu, 1865-1944 og Salomon í Garðshorni 1847-1916 í torvi*